# Atburðarreglur

## hjá ArtiCon

ARTICON
- eitt trygt grundarlag




# Innleiðing

Reglugerðin fyri rættan atburð er gjørd við tí endamáli at hjálpa øllum starvsfólkum í ArtiCon at hava rættan atburð í teirra dagliga arbeiði.
Vit ynskja at reka felagið á rættan og ábyrgdarfullan hátt, og tað er týdningarmikið, at øll starvsfólk fylgja reglugerðini frá ovastu leiðslu til tað einstaka starvsfólkið.

Framhaldandi vøkstur er treytaður av, at kundarnir síggja okkum sum ein álítandi samstarvsfelaga, ið letur røttu vøruna við røttu dygdini. Fyri at røkka hesum máli er avgerandi, at øll í felagnum fylgja felagsins reglugerð fyri rættan atburð og framferðarhátt.




# Virðisgrundarlag

Virksemið í ArtiCon byggir á nøkur grundleggjandi virðir, og tað er av alstórum týdningi, at vit hvønn dag arbeiða við støði í virðis-grundarlagnum.

ArtiCon skal vera kent fyri:

- at vera ein álítandi samstarvsfelagi
- at dygd, trygd og trivnaður eru í hásæti
- at øll arbeiði vera væl úr hondum greidd til kappingarførar prísir
- at vera eitt lokkandi arbeiðspláss við skipaðum viðurskiftum á øllum økjum




# Lógir og reglur

Tað er grundleggjandi, at alt okkara virksemi skal lúka treytirnar í galdandi lógum og reglugerðum, og vit góðtaka undir ongum umstøðum brot á hesar.

# Umhvørvi

Alt okkara virksemi tekur støði í galdandi lóggávu og reglum á umhvørvisøkinum, og vit ynskja at gera okkara ítasta fyri at hava so lítla umhvørvisliga ávirkan sum gjørligt. Umhvørvisatlit skulu hugsast inn í eitthvørt arbeiði, á byggiplássum eins væl og á skrivstovum.



# Starvsfólk, trygd og arbeiðsumhvørvi

Vit góðtaka undir ongum umstøðum happing, ósømiligan atburð, ósømiligan málburð ella annað slag av niðrandi atferð. Harafturat fylgja vit altíð øllum trygdar- og umhvørvisásetingum.

Vit binda okkum til í felag at skapa eitt gott, sunt og trygt arbeiðsumhvørvi fyri øll starvsfólk.

Øll starvsfólk og allir starvsumsøkjarar verða handfarnir á jøvnum føti, óansæð ættarslag, kyn, átrúnað, kynsliga sannføring, aldur ella politiska sannføring.

Vit ynskja framhaldandi at hava eitt gott og konstruktivt samstarv við Arbeiðseftirlitið og aðrar viðkomandi myndugleikar.




# Kapping og mutur

Vit fylgja øllum ásetingum í kappingarlógini og ynskja at stuðla upp undir eina sunna og góða kappingarmentan, har einki boð verður javnað frammanundan í sambandi við útbjóðing. Øll starvsfólk hjá ArtiCon skulu fylgja felagsins reglugerð fyri mutur, og frávik verður ikki góðtikið.

---

# Dygd

Vit ynskja altíð at lata dygdargóða vøru til okkara kundar. Tilvitað frávik og/ella svik í arbeiðinum verður undir ongum umstøðum góðtikið.




# Persónligir og vinnuligir upplýsingar

Vit góðtaka undir ongum umstøðum brot á tagnarskylduna í sambandi við arbeiði og í sambandi við samstarv við okkara samstarvsfelagar. Persónligir og vinnuligir upplýsingar mugu ikki gevast víðari, og tí er atgongdin til viðkvæmar upplýsingar avmarkað.

---

# Brot á reglurnar

Brot á ”Atburðarreglurnar” skulu fráboðast nærmasta leiðara, ið hevur skyldu at boða stjórnini frá.




ARTICON

- eitt trygt grundarlag